# Føroyingar á seiðabergi í Europa

**At gjara út fyri fremmandum ferðafólkum verður fótbólturin brúktur. Sjálvt agnið, ferðamaðurin skal gloypa, er mentan og náttúra Føroya. Á Ferðaráðnum er fólk sett burtur av at taka sær av at marknaðarføra Føroyar í samband við EM undankappingin, sum byrjar í heyst. Serligur dentur verður í fyrsta umfari lagdur á at fáa týskarar og skotar at kenna Føroyar**

MARKNAÐARFØRING
*Edvard Joensen*


*Sissal Kristiansen og Per Hansen á Ferðaráði Føroya arbeiða við at marknaðarføra Føroyar í samband við EM undankappingina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Føroyingar eru av álvara farnir at ganga á seiðaberg úti í Europa. Fótbólturin verður brúktur at gjara við, meðan egnt verður við vinnulívi, náttúru og mentan.

Føroyar skulu marknaðarførast gjøgnum fótbóltin. EM undankappingin komandi er eitt sera gott høvi til tess, og Ferðaráð Føroya er farið undir hetta arbeiðið.

At Føroyar komu í bólk við Týsklandi, Skotlandi, Íslandi og Litava, gevur føroyskari ferðavinnu rímiliga góðar møguleikar at røkka einum stórum kundaskara, siga tey bæði Per Hansen og Sissal Kristiansen, sum á Ferðaráði Føroya arbeiða við uppgávuni at marknaðarføra Føroyar gjøgnum føroyska fótbóltslandsliðið.

Ymsir tankar hava verið uppi. Eitt nú at vinnufyritøkur og mentanarlív skulu vera við í stóru marknaðarføringini. Tað verða tey fyri so vítt eisini, men tað verður í stóran mun ferðavinnan, sum kemur at mynda hesa herferðina.

### Ymsar ætlanir

Ymsar hugsanir hava verið frammi um, hvussu best mundi vera at gera vart við Føroyar úti í heimi.

Tosað hevur verið um alt frá pressutúrum hendanveg til at hava smáar framsýningar við básum í samband við fótbóltsdystir uttanlands.

Tað, sum serliga hevur áhuga í hesum sambandi, er dysturin, Føroyar skulu spæla í Týsklandi í heyst. Og í samband við hann hava rættiliga nógv góð hugskot verið uppi og vent.

Nevnt hevur verið at latið ymsar vinnufyritøkur staðið fyri marknaðarføringini. Men okkurt var, sum bendi á, at vinnan onkunsvegna var eitt sindur bangin fyri at fáa ov lítið burtur úr í mun til ísettar pengar, og tí er líkasum gingið frá hesi hugsan aftur, tí mett varð, at vandi kundi vera fyri, at í so nógvur dentur so varð lagdur á egin áhugmál, og tann almenna marknaðarføringini kanska datt afturum, sigur Sissal Kristiansen.

Milum annað tí er málið endað aftur í upprunatankanum, har tað verður ferðavinnan, sum fer at standa fyri tiltakinum.

Og so má hendan vinnan leggja høvur í blot og finna upp á okkurt reiðiliga originalt, sum kann fanga áhuga útlendinga fyri Føroyum.

Eitt nú hevur verið uppi, at stuttligt hevði verið at fingið Rúna Brattaberg, sum er kendur sangari, at sungið tjóðsangin undan landsdystinum í Hannover.

– Tað hevði fangað, halda tey bæði Per og Sissal á Ferðaráðnum, og hevði heilt vist givið nakað nógv meira enn ein lýsing, um hon so røkkur kring allan vøllin eina løtu.

### Bólturin sum gjar

Tað verður neyvan bert fótbóltsspæl okkara, útlendingar vilja síggja, heldur Sissal Kristiansen. Heldur er tað annað, sum liggur uttan fyri hetta spælið, sum áhugan vekir, vísir hon á.

Og kortini er tað ikki heilt frítt, at fótbólturin hevur áhuga millum útlendsk tíðindafólk, sum ikki beinleiðis eru ítróttarjournalistar.

Til dømis veit Sissal Kristiansen at siga, at enn í dag eru útlendsk tíðindafólk, sum vilja sleppa at hitta Torkil Nielsen og Jens Martin Knudsen. So heilt hevur sjálvtin í Landskrona ikki lagt seg kortini.

So eru tað mentan og náttúra, sum altíð eru áhugaverd hjá útlendingum, sum hava Føroyar á ferðaskránni.

– Tað frættist skjótt, tá okkurt óvanligt hendir, vísir Sissal Kristiansen á. Til dømis tað, at Sunleif Rasmussen fekk norðurlendsku tónleikavirðislønina, hava tey eisini frætt í Týsklandi, og so eru Føroyar knappliga nakað serligt. Eitt nú er hetta longu nevnt í onkrum teldubrævi, Ferðaráðið hevur fingið.

Eisini náttúran er nakað, sum vit skulu leggja dent á. Sovorðið sum fossar kenna nógv býarfólk einki til, og ein vanligur regndagur í Føroyum kann hava stóra ávirkan á fremmandafók, vita tey at siga á Ferðaráðnum.

Hetta og annað mangt fáa føroyingar høvi at vísa útlendskum tíðindafólkum, sum koma hendanveg seinnapartin í summar. Eini 20 fólk verða væntandi í einum ferðalagi av fremmandum tíðindafólkum. Býtið verður helvt um helvt týskarar og skotar.

Valt er at satsa upp á hesi bæði londini í fyrsta umfari, meðan Ísland verður goymt til einaferð næsta ár, tá tørnið kemur at spæla í móti teimum.

At hetta er handilsliga merkt, er eyðsæð. Tí eisini eitt annað land, Litava, er við í bólkinum, Føroyar luttaka í. Men har tosar eingin um marknaðarføring. Tað er greitt, at tað er londunum, har nógvu pengarnir eru, vit skulu hava fatur á.

Men einki nyttar við marknaðarføring og pressutúrum ella hvat tað nú kann vera, um ikki føroyingar sum heild eru við í tiltakinum, siga tey Per og Sissal á Ferðaráðnum.

Neyðugt er, at fólk taka væl í móti hesum útlendsku gestunum, sum koma at kunna seg um Føroyar, og vilja tosa við tey.

Tí tað skerst ikki burtur, at nakrar góðar, positivar blaðgreinar ella sjónvarpssendingar hava alstóran týdning fyri at menna vitskuna hjá vanliga europearanum um, hvar og hvat Føroyar eru.


*At Føroyar eru komnar í bólk við Týsklandi gevur okkum ein einastandandi møguleika at marknaðarføra okkum úti í heimi, siga tey á Ferðaráðnum. Uppgávan verður nú at finna rætta háttin at gera hetta, soleiðis at flest fólk leggja merki til okkum*

*Mynd: Reuters*

## Føroyakvøld í Eysturoy

**Í ár verður aftur farið undir at skipa fyri føroyakvøldum í Eysturoynni. Føroyakvøldini eru ætlað bæði okkara summargestum og okkum føroyingum**

Tíðindaskriv

Ætlanin er at skipa fyri eini átta til tíggju føroyakvøldum ymsastaðni í oynni. Vit vita at hóskandi mongd av ferðafólki gistir í oynni tíðirnar, kvøldini eru løgd. Hesi ferðafólk verða boðin við til kvøldini, og føroyingar við gestum eru sjálvsagt eisini vælkomnir. Grundarlagið fyri at fáa slík kvøld at vera væleydnaði er, at luttøkan verður nóg stór.

Fyrsta kvøldið verður um vikuskiftið í Skótadeplinum á Selatrað fyri gestum, ið gista har, og øðrum ferðafólki. Komandi fríggjakvøld 28. juni kl. 19.30 verður Kappróðrarneystið á Glyvrum karmur um føroyakvøld. Fyriskiparnarnir av hesum føroyakvøldinum eru foreldur at dreingjum 16 ár hjá NSÍ, sum skulu til Liverpool á venjingarlegu í august mánaða.

Føroyakvøldini verða fjølbroytt og ikki eins á ymsu støðunum í oynni. Borðreitt verður við góðum føroyskum mati og fjølbroyttum føroyskum undirhaldi. Undirhaldið kemur at lýsa bæði gamla og nýggja føroyska mentan heilt frá føroyskum dansi og kingosangi til nýmótans vísusang og smáar framførslur.

Føroyskt framleiddar vørur verða eisini til keyps.

Atgongumerkir verða at fáa á kunningarstovunum og aðrastaðni kring landið. Lýst verður nærri um atgongumerkjasølu í vikuni. ll eru vælkomin at seta seg í samband við kunningarstovurnar fyri at fáa nærri upplýsningar um føroyakvøldini.



# Tingmaður er útvarpsstjóri

**Jógvan Arge, ið situr á tingi umboðandi Tjóðveldisflokkin sum varamaður fyri Høgna Hoydal, er í løtuni virkandi útvarpsstjóri fyri Jógvan Jespersen, sum er í feriu. Tað er skeivt, heldur fyrrrverandi ábyrgdarblaðstjórin á Dimmalætting, Beate L. Samuelsen, sum sjálv fór í farloyvi, tá hon varð vald í Tórshavnar Býrað. Tað er einki problem, sigur Jógvan Arge.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*


*Hvørt Jógvan Arge framhaldandi verður varastjóri og programleiðari, ætlar Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, at taka støðu til eftir lokna feriu*

Jógvan Arge, programleiðari og varastjóri á almenna fjølmiðlastovninum Útvarpi Føroya, hevur síðan 15. mai í ár umboðað Tjóðveldisflokkin á tingi sum varamaður fyri Høgna Hoydal, landsstýrismann.

Stutt eftir løgtingsvalið fór útvarpsstjórin, Jógvan Jespersen, í feriu, og síðan tá hevur Jógvan Arge verið virkandi útvarpsstjóri.

Sambært stýrisskipanarlógini mugu løgtingslimir ikki røkja meira enn hálvt starv við síðuna av løgtingsarbeiðinum, og tí er Jógvan Arge farin niður í hálva tíð, men annars eru starvsviðurskifti hansara ikki broytt.

Sjálvur sær Jógvan Arge ongan trupulleika í at røkja starvið sum varastjóri og programleiðari á Útvarpi Føroya, samstundis sum hann røkir embætið sum løgtingslimur.

- Eg dugi ikki at síggja, hví tað skal vera eitt problem. Eg gangi út frá, at eg havi lov til at hava eitt alment starv við síðuna av løgtingsarbeiðinum. Eg hugsi ikki, at eg kann verða koyrdur frá av tí at eg nú siti í Løgtinginum. Nakað annað er so um stundir vera til at røkja mítt borgarliga starv afturat løgtings- og býráðsembætinum. Tað dugi eg ikki at siga í dag. Tað fer tíðin at vísa, sigur Jógvan Arge.

### Kann saktans koma í trupulleikar

Formelt er heldur einki galið við at røkja eitthvørt starv við síðuna av løgtingsembætinum, men fleiri dømi eru um, at fólk í føroyska fjølmiðlaheiminum hava tikið seg aftur, tá tey hava fingið politisk embæti at røkja.

Tað ætlar Jógvan Arge ikki at gera.

- Tað burdi hann gjørt, heldur Beate L. Samuelsen, fyrrverandi ábyrgdarblaðstjóri á Dimmalætting. Beate L. Samuelsen valdi at fara í farloyvi frá blaðstjórastarvinum og gerast vanlig blaðkvinna, tá hon varð vald í Tórshavnar Býráð í november 2000.

- Man kann saktans koma í trupulleikar av at hava eitt leiðarastarv við síðuna av politiksum arbeiði, kanska serliga í fjølmiðlaheiminum. Tá hevur man eftir mínum tykki skyldu at velja sítt fólkavalda politiska embæti fram um og lata hitt liggja. Man kann ikki røkja tvey slík størv, heldur ábyrgdarblaðstjórin í farloyvi, sum heldur at Jógvan Arge burdi verið farin frá sum varastjóri, longu tá hann varð valdur inn í Tórshavnar Býráð. At ein tingmaður røkir starvið sum programleiðari í Útvarpi Føroya sær hon hinvegin ongan trupulleika í.

### Persónlig meting

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, vil hvørki gera viðmerkingar til hvat hann persónliga ella sum floksformaður heldur um, at varamaður hansara í løtuni røkir starvið sum útvarpsstjóri.

- Flokkurin tekur ikki støðu til hvat tingmenn takast við uttan fyri tingarbeiðið. Tað má vera ein persónlig meting hjá hvørjum tingmanni sær, um hann metir seg megna at halda sínar leiklutir atskiltar, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal var sjálvur tíðindamaður fyri Sjónvarp Føroya, áðrenn hann valdi at fara inn í politikk. Men við avgerðini um at lata seg stilla upp til løgtingsvalið, boðaði Høgni Hoydal frá, at hann ikki longur metti seg kunna røkja starvið sum tíðindamaður.

- Tað var ein prinsipiel avgerð, sum eg tók ta løtuna eg valdi at gerast limur í Tjóðveldisflokkinum og soleiðis fara upp í partapolitikk. Tá metti eg, at uttan mun til um eg varð valdur ella ikki, so kundi eg ikki venda aftur til eitt starv sum tíðindamaður við politikki sum arbeiðsøki.

Høgni Hoydal vil tó ikki draga paralellir millum sína støðu og ta støðuna, sum Jógvan Arge er í, tí Jógvan Arge arbeiðir ikki sum tíðindamaður.

### Avgerð tikin 1. juli

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, hevur enn ikki tikið støðu til, um starvið hjá Jógvan Arge í Útvarpi Føroya skal broytast, nú tað er greitt, at hann helst verður sitandi sum tingmaður hetta valskeiðið. Hann fór í feriu áðrenn sitandi samgonga varð skipað og tað gjørdist greitt, at Jógvan Arge fór at sita sum varamaður fyri Høgna Hoydal, og tí hevur støðan ikki verið viðgjørd, sigur Jógvan Jespersen.

- Men eg komi aftur til arbeiðis 1. juli, og tá verður ein avgerð tikin, sigur útvarpsstjórin, sum beinanvegin tað gjørdist greitt, at Jógvan Arge var uppstillaður til løgtingsvalið, valdi at loysa hann frá programleiðarastarvinum í tíðini fram til valið.

- Tað var fyrstu ferð at vit komu í ta støðu, at ein programleiðari var uppstillaður til løgtingsval. Nú eru vit so í tí støðu at programleiðarin og varastjórin situr sum fólkavaldur í løgtinginum. Hvat tað viðførir, taka vit støðu til so skjótt eg komi aftur til arbeiðis, sigur Jógvan Jespersen.

# Summarbrasstónar úr London

**Teir fimm messingblásararnir eru allir mitt í tjúgunum. Teir hava allir tikið prógv frá Royal Academy of Music í London, men stava úr ávikavist Argentina, Bretlandi, Svøríki og Føroyum. Messingkvintettin Albin Brass spælir tónleik á høgum altjóða støði við einum skeivum smíli. Í kvøld spæla teir fimm í Klaksvík sum partur av Summartónum**

SUMMARTÓNAR
*Rúnar Reistrup*

Tað ber til at taka ljóðføri og tónleikin í álvara uttan at vera turrisligur á palli - eisini um tú ert klassiskur yrkistónleikari. Tað tykist at vera vørumerki hjá messingkvintettini Albin Brass, sum við fjølbroyttari skrá og einum smíli handan munnstykkini roynir at halda áhoyrararnar í góðum lag ígjøgnum konsertir sínar.

- Vit eru ikki keðiligir, tá vit spæla. Nógvir klassiskir tónleikarar geva sær fyrst og fremst far um ljóðið, tá teir framføra. Vit royna í eins stóran mun at hugsa um heildina í okkara framførslu, tí umframt at fólk skulu hoyra vælspældan tónleik, skulu tey eisini gjarna fara heim aftur við einum smíli, sigur trompetleikarin Anders Nyqvist. Hann er svii, og er ein fimtingur av kvintettini Albin Brass.

Hinir fýra fimtingarnir eru úr ávikavist Bretlandi, Argentina og Føroyum. Teir fimm møttust á Royal Academy of Music í London, hagandi teir allir nú hava tikið prógv innan klassiskan messingtónleik. Nú arbeiða teir sum yrkistónleikarar í ymsum samanhangum í Bretlandi og aðrastaðni.

Tað er føroyski parturin av kvintettini, 24 ára gamli trombonleikarin Andras Olsen, sum hevur fingið Albin Bras at leggja leiðina framvið Summartónum.


*Albin Brass eitur messingkvintettin hjá Anders Nyqvist (trompet), Valentin Garvie (trompet), Nick Wolmark (horn), Andras Olsen (trombon) og David Polkenhorn (tuba). Kvintettin hevur heimstað í London, har flestu av tónleikarunum búgva.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

### Tango og sálmar

At tónleikararnir í Albin Brass koma úr fýra ymiskum londum setir síni týðuligu tekin á konsertirnar. Summartónaskráin hjá kvintettini er sett saman av tangoløgum, føroyskum sálmum, svenskum vísum og meira nútímans verkum eftir føroyskum og útlendskum tónasmiðjum.

Hetta ger konsertirnar hjá kvintettini rættiliga sermerktar og samstundis áhugaverdar hjá teimum, sum kanska ikki hava so nógv skil fyri modernaðum verkum fyri messingblásarar. Slík spælir kvintettin tó eisini á konsertum sínum.

Farna hósdag spældi Albin Brass í Listaskálanum í Havn, í kvøld spælir hon í Býráðshøllini í Klaksvík, og sunnudagin er kvintettin aftur í Listaskálanum. Konsertin í kvøld byrjar klokkan 20.00.